## Listaframsýning á Mentamálaráðnum



Hans Jørgen Remmer letur upp listaframsýning í Mentamálaráðnum hósdagin 17. januar 2008 kl. 15.00. Listaframsýningin hevur heitið "Ferðafólk", og sýnir hann fram verk á pappíri, vatnlitir, pastel og tekniblekk saman. Menniskjan verður lýst, og hevur hvíta pappírið ein týðandi leiklut í framsýningini. Hans Jørgen Remmer er føddur miðskeiðis í tredivunum í Danmark, har hann eisini er uppvaksin. Á sumri 1975 flutti hann saman við familjuni til Føroya at búgva og var við á Ólavsøkuframsýningini í Listaskálanum í 1975 og 1976. Hann hevur málað í ymiskum londum, t.d. í Íslandi, í Grønlandi og í París í 50'unum, og hevur luttikið á fleirtjóða framsýningum, í Wiesbaden, Týsklandi og í Canada í 1969. Málikynstrið tók hann upp aftur av álvara í 99'. Til ferniseringina fara Maria Heinesen og Anna Smith fara at spæla barokktónleik. Framsýningin verður hangandi til 15. apríl 2008.

## Val karaoke í Glitni

Glitnir skipar fyri valkaraoke fríggjakvøldið 18.01 frá 23.00. Ætlanin er at fáa valevni frá flokkunum at royna seg við sangi. Skipað verður fyrst fyri einum umfarið, har hvør flokkur fær 3 sangir hvør, valevnini fyri flokkarnar avgera sjálvi hvør syngur. Síðan verður mett um hvussu eydnaðist og eftirfylgjandi fær hvør flokkur enn møguleika at syngja 2 sangir. At enda fær vinnandi flokkuin høvi at syngja 2 sangir, umframt møguleika at agitera og koma við einari seinastu áheitan "um at velja rætt". Loyvi er sjálvandi at agitera og royna at tiltuska sær nakrar atkvøður gjøgnum alt kvøldið, og møguleiki er somuleiðis at hava plakatir við – hesar kunnu heingjast upp áðrenn tiltakið byrjar.

# Valevni hjá Javnaðarflokkinum skutu við skørpum - eftir hvørjum øðrum

**Valfundurin í Hvalba í gjárkvøldið bleiv ein rættiligur hvøkkur fyri áhoyrararnar, tá ið tvey høvuðsvalevni hjá Javnaðarflokkinum fóru at skjóta við skørpum eftir hvørjum øðrum fyri opnari mikrofon og so pínligari støðu hevur formaður Javnaðarfloksins neyvan nakrantíð áður verið í á einum almennum valfundi**

VALFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Tey, sum hava saknað valfundur av tí góða gamla slagnum, skuldu havt verið í Roynhøllini í Hvalba í gjárkvøldið.

Har var óvanliga nógv fólk møtt á valfundi í gjárkvøldið og tað kann ikki sigast annað, enn at teir 500 áhoyrararnir fingu ein minniligan valfund við sær til húsar aftur.

Men hetta var eisini ein valfundur, sum Javnaðarflokkurin uttan nakran sum helst iva helst vil sleppa at jarða og gloyma sum skjótast.

Á fundinum hendi nevniliga tað, at tvey av høvuðsvalevnunum í Suðuroy, Jóannes Eidesgaard, sum er formaður í Javnaðarflokkinum endaði í opnum stríði við Nitu Næs, sum er besta boðið upp á ein kvinnuligan tinglim í Suðuroy.

Tað endaði við, at løgmaður var so kroystur, at hann føldi eg noyddan til at seta Nitu Næs upp á pláss fyri opnari mikrofon.

Men Nita Næs svaraði líka kontant aftur og skeyt løgmann beint í eina av hansara eymu líktornum.



*Fundarfólkið fekk ein óvanliga lívligan og undirhaldandi valfund í Hvalba í gjárkvøldið, men tað er lítið at ivast í, at hetta var eitt upplivilsi, sum Javnaðarflokkurin vildi verið fyriuttan*

### Boraðu í Javnaðarflokkinum

Ikki óvæntað bleiv eftirskúlin í Hvalba eitt høvuðsevni á valfundinum.

Allir flokkar hava boðað frá, at teir taka fult undir við ætlanini at byggja eftirskúla í Hvalba.

Men Javnaðarflokkurin hevur verið í eini serligari støðu, tí eitt av valevnunum hjá flokkinum, Nita Næs, sum enntá eisini er úr Hvalba, hevur barst við hond og fót ímóti at eftirskúlin verður lagdur við fótbóltsvøllin í Hvalba, har ætlanin er at byggja hann.

Hon hevur tó altíð lagt stóran dent á, at hon avgjørt er fyri at eftirskúlin verður lagdur í Hvalba, men hon vil hava eitt orðaskifti um, hvar hann skal byggjast og við fótbóltsvøllin skal hann so ikki vera.

Støðan hjá Javnaðarflokkinum gjørdist ikki betri av, at Nita Næs sama dag, sum valfundurin var sendi faldara í hvørt hús, har hon greiddi frá, hví hon er ímóti at byggja eftirskúlan við fótbóltsvøllin.

Eftirskúlin er ein stór ætlan, tí hann kostar einar 90 milliónir krónur at byggja og hann førir eini 12-15 almenn arbeiðspláss við sær, umframt tað avleidda virksemi, sum ein slíkur stovnur førir við sær.

Tí gjørdu fleiri valevni eftirskúlan til eitt høvuðsmál í valfundinum, tí teir ásannaðu, at hann fer at fáa ómetaligan týdning fyri eitt pláss sum Hvalba og tað var funnin frensur hjá teimum at bora í tvístøðuni í Javnaðarflokkinum.

Tað gjørdu áhoyrararnir sanniliga eisini, tá ið teir fingu høvi at spyrja, tí nógv teir flestu spurningarnir vóru júst um eftirskúlan.

### Idiotiskur spurningur

Nita Næs tvíhelt um sína mótstøðu ímóti at byggja eftirskúlan við fótbóltsvøllin og Jóannes Eidesgaard kom mestsum í neyð, tá ið hann aftur og aftur royndi at sannføra áhoyrararnar um, at Javnaðarflokkurin tekur fult og heilt undir við ætlanini at byggja eftirskúlan.

Men hetta var torført hjá øðrum valevnum og fundarfólki at taka fyri fult, tá ið lokala valevni hjá sama flokki framhaldandi helt fast við sína støðu.

Tað leikaði hart á og at enda vildi ein áhoyrari hava greitt at vita frá Nitu Næs, um hon hevði atkvøtt fyri ella ímóti einum eftirskúla í Hvalba, verður hon vald á ting.

Nita Næs staðfesti, at hon vildi framvegis ikki hava skúlan við fótbóltsvøllin og hon góðtók ikki, at hvalbingar høvdu fingið eitt ultimatum, at antin skal skúlin byggjast við fótbóltsvøllin, ella verður hann ikki bygdur yvirhøvur. Tí helt hon, at spurningurin var idiotiskur, sum hon málbar seg og tí vildi hon ikki svara upp á hann.

### Skutu hvønn annan

Tað man vera langt síðani, at Jóannes Eidesgaard hevur verið í eini so pínligari støðu á einum almennum valfundi og tað endaði eisini við, at hann føldi seg noyddan at seta Nitu Næs upp á pláss fyri opnari mikrofon.

Hann gjørdi greitt, at sum formaður í Javnaðarflokkinum kundi hann boða frá, at orðini hjá Nitu Næs standa fyri hennara egnu rokning.

- Javnaðarflokkurin tekur heilt og fult undir við eftirskúlanum í Hvalba og longri er tann søgan ikki, segði hann

Hann legði eisini dent á, at tað er kommunan sum gevur byggiloyvi. Spurningurin um, hvar skúlin skal vera, skulu landsstýrið og løgtingið halda fingrarnar vekk frá, tí tað er kommunan einsamøll, sum gevur byggiloyvi og ger av, hvar skúlin skal vera.

Men orrustan ímillum valevninini hjá Javnaðarflokkinum var ikki liðug enn, tí Nita Næs svaraði líka kontant aftur og skeyt løgmann aftur beint í eitt av hansara eymu líktornum

- Eg vil bara siga eitt stættarstríðið í Føroyum er als ikki av, kunngjørdi hon.

Hetta var ein týðiligt spark til formannin í Javnaðarflokkinum, sum í eini formansfrágreiðing á einum landsfundi í flokkinum fyri einum tveimum árum síðani staðfesti, at stættarstríðið er av og at tað er vunnið. Hetta hevur Javnaðarflokkurin hoyrt nógv fyri síðani, bæði frá politiskum mótstøðumonnum og frá fakfelagsrørsluni og nú fekk hann tað so aftur skotið í skógvarnar fyri opnari mikrofon frá sínum egna valevni.

### Demokratisk avgerð

Tað vóru eisini mong onnur valevni, sum tosaði um eftirskúlan og fleiri vísti á, hvussu stóran týdning, hann fór at fáa fyri Hvalba, Suðuroynna alla og fyri allar Føroyar.

Men teir vístu eisini á, at tað var nyttuleyst hjá valevnum til løgtingsvalið at tosa um, hvar skúlin skuldi vera, tí tað er ein spurningur, sum kommunan avgerð einsamøll.

Teir førdu eisini fram, at í hesum føri hevur málið verið ígjøgnum alla mylnuna og ein avgerð er tikin á fólkaræðiligum grundarlagi. Sipað varð til, at bygdaráðið hevur einmælt samtykt at eftirskúlin kann byggjast við fótbóltsvøllin. Mótmæli eru send innlendismálaráðnum og har er avgerð eisini tikin og hon sigur, at skúlin kann byggjast á økinum. Men verður skúlin ikki bygdur skal økið fáa frið.

Tað vóru eisini onnur lokalmál frammi á valfundinum í Hvalba og eitt, sum fall í góða jørð, var, at allir flokkar lovaðu at virka fyri, at hvalbiartunnilin verður raðfestir frammaliga.



*Støðan var spent við borðið, har umboðini hjá Javnaðarflokkinum sótu á valfundinum í Hvalba í gjárkvøldið. Frá vinstru eru tað Mikkjal Sørensen úr Javnaðarflokkinum, Jaspur Vang, Johan Dahl úr Sambandsflokkinum, Maria Joensen úr Javnaðarflokkinum, Selma Sandá úr Sjálvstýrisflokkinum og Nita Næs úr javnaðarflokkinum, sum fekk ein høvuðsleiklut á fundinum*